LM-070/2020

Fylgiskjal 5

AKT 19 Høyringssvar frá Heilsuhjálparafelag Føroya

Fíggjarmálaráðið
Tinganes

Tórshavn 07.02.2019

Hoyringssvar viðvíkjandi uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (eftirlønarlógin)(Frítøka fyri uttanlandsinntøku, hækking av bundna inngjaldinum og javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar).

Heilsuhjálparafelag Føroya, hevur fingið omanfyristandi uppskot til hoyringar, og hava vit hesar viðmerkingar til uppskotið.

Viðvíkjandi §2, stk. 2. Um bundna eftirlønargjaldið. Felagið tekur undir við, at bundna eftirlønargjaldið hækkar soleiðis, at 1. januar 2029, er gjaldið komið uppá 15%.
Flest øll feløg á arbeiðsmarknaðinum hava longu nú eftirlønarskipan á 15%.

Viðvíkjandi §1, stk. 9 og § 3, stk. 18. Felagið tekur undir við, at skipanin verður gjørd smidligari, og at lógin verður broytt soleiðis, at inntøka, sum er forvunnin fyri arbeiði uttanlands í starvi hjá arbeiðsgevara við heimstað uttanlands, verður undantikin nevndu peningaupphæddum.

Felagið hevur tó fyrivarni fyri, at skatturin av eftirlønargjaldi av uttanlandainntøku, ið allur fellur til kommunurnar, nú fellur burtur. Í hvønn mun verður hædd tikin fyri, at kommunurnar missa hendan partin av inntøkuni?

Viðvíkjandi §7, stk. 4, um at tryggja javnbjóðis kapping millum eftirlønarveitarar. Felagið tekur undir við, at somu treytir eru galdandi fyri allar eftirlønarveitarar.

Heilsuhjálparafelag Føroya

Mary Antonsdóttir, forkvnna

Ása Olsen, fyrisitingarleiðari

Fr. Petersensgøta 7 · FO-100 Tórshavn
Telefon 317725 · Fax 319117 · email: hhff@hhff.fo · heimasíða.: www.hhff.fo